

## 100 ára gomul vrakpetti

Avstralskir granskarar halda seg hava funnið vrakpettir av einum flogfari, sum pólfararin Douglas Mawson tók við sær til Antarktis longu í 1912. Jarðfrøðingurin og pólfararin, Douglas Mawson, stóð fyri tveimum kanningarferðum til Antarktis í byrjanini av 1900-talinum. Í 1912 tók hann við sær eitt propelluflogfar. Flogfarið, sum varð bygt av bretska framleiðaranum Vickers í 1911 fekk eina harða lending á Antarktis longu í byrjanini av ferðini. Hóast veingirnir vórðu skaddir, brúkti Mawson kortini flogfarið sum eina sletu við motori undir kanningarferðini. Sum tíðin fekk, oyðilegðist motorurin á flogfarinum av nógva kuldanum. Miðskeiðis í sjeytiárunum siga granskarar, sum vóru á Antarktis, seg hava tikið myndir av flogfarinum. Men síðan tá skal eingin hava sæð flogfarið, fyrr enn nú vrakpettir eru funnin. - Nú hava vit so funnið partar av flogfarinum, skrivar Tony Steward sambært tíðindastovuni AP á heimasíðu hjá granskarunum. Gjøgnum trý summar hevur granskarabólkurin Mawson's Hut Foundation leitað eftir flogfarinum á Antarktis.

# Brúki ikki tíðina upp á Paris

**Hóast úrskurðurin fyri uttanfyri standandi tykist ein greiður sigur til KÍ, so metir formaðurin, Tummas Lervig, at felagið við hesum er bumbað fleri ár aftur í tíðina**

SAKARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eg meti hetta ikki sum ein sigur.

So bersøgin er Tummas Lervig, formaður í KÍ, tá fólk hava hug til at ynskja honum tillukku við úrslitinum av sakarmálinum, sum Tony Paris hevði lagt móti felagnum.

At hann yvirhøvur fekk viðhald í nøkrum av ákærupunktunum, er eitt tap fyri okkum, og tað er eitt vónbrot fyri meg, at rætturin ikki tekur støðu til, hvønn Tony Paris hevði sáttmála við, sigur Tummas Lervig.

Formaðurin í KÍ sigur, at hann enn ikki hevur sæð sjálvan dómin, og tí fær hann illa gjørt meiri nágreiniligar viðmerkingar til úrskurðin.

Men hann dylur ikki fyri, at hetta er meiri enn dyggur smeitur fyri KÍ.

Vit hava arbeitt hart fyri at fáa felagið upp á føtur aftur fíggjarliga, men við hesum dóminum er alt farið fyri bakka. Felagið er stutt sagt bumbað fleiri ár aftur í tíðina, sigur Tummas Lervig.

Hann heldur, at føroyingar samstundis hava lært ein hilan hóp av hesum málinum.

Nú er prógvað, at venjarar bara kunnu fara rættarvegin og fella feløgini niður í knæ. Vit mugu veruliga siga, at fortíðin hevur innheintað okkum í hesum málinum, sigur Tummas Lervig.

Tá vit tosaðu við formannin í KÍ stutt eftir at dómurin var fallin, var so stutt frá liðið, at hann dugdi ikki at siga nakað um, hvat nú fer at henda.

Nú fara vit at lesa dómnin nærri, og so rokni eg við, at aftan á nevndarfundin, sum verður í kvøld, verður støðan eitt sindur greiðari. Men eitt er vist: einki verður tað sama eftir hendan dómin, sigur Tummas Lervig.

Hann væntar at tað verður meiri enn trupult at útvega peningin, ið KÍ nú skal gjalda til Tony Paris, tí, sum hann sigur: Hvar í vinnulívinum finnast hasir pengarnir í dag?

Eitt er so vist, eg tími ikki at brúka mína frítíð til at savna pening inn til Tony Paris, staðfestir formaðurin í KÍ, Tummas Lervig.



*Tummas Lervig ivast í løtuni í, hvør framtíðin hjá KÍ er*

## Stórsigur fyri KÍ

**Tony Paris fekk lítið burtur úr at stevna KÍ eftir 1,3 milliónum krónum fyri at hava koyrt hann úr starvi uttan grund**

SAKARMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tony Paris hevði helst sett nøsina upp eftir einari størri upphædd enn teimum umleið 360.000 krónum, sum dómarin, Jóannes Madsen, dømdi KÍ at rinda amerikaniseraða onglendinginum.

Fyri KÍ merkir tað so ein útreiðsla á umleið 410.000 krónur, tí felagið skal eisini rinda fyri sakarmálskostnaðin.

Tony Paris var ikki til staðar í rættinum, tá dómurin varð avsagdur, men sakførari hansara var, Jens Vang. Han hevði tó ongar viðmerkingar til dómin, tí hann hevði ikki tosa við klient sín enn.

Eisini saførarin hjá KÍ, Jógvan Elias Winter Poulsen, var í rættinum í dag, hann var nevniliga sakførari í báðum málunum, har dómur fall í dag.

# Hummaraátarar fríkendir

**George L. Petersen, Marni Gunnar Simonsen, Kalmar Lindenskov, og Henrik Kerrn-Jespersen eru allir fríkendir fyri djórapínslu, sum teir vórðu ákærdir fyri, tá teir ótu livandi hummara í 2005. Teir sluppu enntá frá sakarmálskostnaðinum**

DÓMUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Allir ákærdu partarnir í hummaramálinum, sum upprunaliga byrjaði í 2005, tá hesir allir ótu livandi hummara í eini ráðstevnu, eru í dag frídømdir í Føroya Rætti.

Tað hevur annars tikið sína tíð hjá ákæruvaldinum at fáa málið klárt, so ikki fyrr enn í dag, varð dómur sagdur.

Orsøkin til, at menninir vóru frídømdir, er, at hummari ikki verður mettur sum vanligur fiskur, ella djór við geislum, og tí er hummari lægri standandi djór.

Sakarmálskostnaðurin verður goldin av tí almenna.

### Fegin um frídøming

Georg L. Petersen, sum er ein av teimum, ið varð frídømdur í rættinum í dag, og hann er fegin um frídømingina.

- Vit fegnast sjálvandi, at vit eru frídømdir í hesum málinum, har vit í fimm ár hava verið ákærdir fyri at vera djórapínarar, sigur Georg L. Petersen.

Í málinum hava blaðmenninir, sum vóru undir ákæru alla tíðina ført fram, at blivu teir dømdir, so var tað at skerja talufrælsi, tí teir dokumenteraðu bert tað, sum nógv onnur, harímillum politikarar eisini høvdu gjørt.

- Politikararnir fortaldu enntá í rættinum, at teir høvdu etið hummarar, men ákæran var bert reist ímóti okkum, undrast Georg L. Petersen framvegis.

Eftir rættarfundin fóru teir fríkendu at fáa sær ein betri bita, og Georg L. Petersen greiddi frá, at funnu teir hummara, so kundi tað verið eitt gott hugskot.




*Í 2005 ótu Georg L. Petersen og nógv onnur livandi hummara. Í dag vóru allir, sum vóru ákærdir fyri djórapínslu fríkendir*